# Narrar í fólkaflokksparadísinum ella sosialistiskir stríðsmenn?

DAGFINNUR DANBJØRG



Einaferð var tað ein prestur, ið hevði ein pappageyk, sum var tiltikin fyri at lýsa vælsignilsir. Ein sjómaður - sum búði í somu bygd, sum presturin - hevði eisini ein pappageyk, men hansara lýsti eiðir og forbannilsir tann líðilanga dag. Tá presturin fekk at vita, hvussu vorðið var, bjóðaði hann sjómanninum at fáa loyvi til at seta sín pappageyk í búrið saman við hansara, tí so kundi hann leggja banniorðini av og fara at lýsa vælsignilsir. Men hvat hendi? Eftir fáum døgum bannaðu báðar líka illa. Hetta rann mær í hug, nú eg skrivi - og havi skrivað - um tað ólukkuligu høgrasnaringina, sum serliga Javnaðarflokkurin hevur verið fyri, eftir at hava verið í fólkaflokspappageykabúrinum í nøkur ár. Onkur vælsignilsir flóta - sum valagn - enn út gjøgnum munnin á javnaðarmonnunum, men tá munurin millum praktiskan politikk millum nevndu báar flokkar skal síggjast, tá mugu bæði sjóneykur og specialkirugar til fyri at hóma frábrigdi. Teir eru vorðnir eins og siamesiskir tvíburðar, og tessvegna er neyðugt at taka eina uppgerð við teir, ið svikið hava, og at seta neyðugar kirugar at operera teir frá hvørjum øðrum, soleiðis at Javnaðarflokkurin aftur finnur sítt upprunaliga støðið. Og eins og burturvilsti sonurin, sum eisini var farin av leið og var endaður millum svínini, gekk í seg sjálvan og vendi heim aftur, tí tá vil eisini stórt gildi verða hildið millum tey mongu, ið svikin hava verið og enn eru, um teir burturvilstu koma heimaftur og fara til verka fjøldini at frama.

Spurningurin er um virðir. Ikki um eyðræning av fólkinum, sum vit hava sæð tey mongu síðstu árini, og sum hevur koyrt allan Heimin av sporinium og fólkið í armóð og arbeiðsloysi. Helararnir eru sjálvandi líka sekir, sum rænararnir. Og Javnaðarflokkurin varð hvørki stovnaður fyri at vera rænari ella helari, men verja hjá vanliga fólkinum, serliga teimum veiku og teimum, ið liva á lívsins skuggasíðu. Hetta má aftur í hásæti og boyggjast í lýsandi neon, so ein og hvør kann síggja gamla stavnhaldið, sum tá aftur er vorðið nýtt. Fólkapensiónin - sum var og er ein av teim stóru varðunum í Javnaðarfloksins søgu - stendur nú fyri skotum. So um tit ikki kunnu koma til fornuft - hvat Guð má forbjóða - so skjóti eg hervið upp, at tit lóggeva pensiónsaldurin frá 67 til 90 ár, tí so hava tit loyst tykkara stóra borgarliga pensiónstrupulleika, og fólkið kann so við eitt komandi val sleppa av við tykkum sum trupulleika og kann síðani stovna nýggja verju.

Tí øll kunnu lata seg keypa. Bárður hevði sitið sum løgmaður í dag, um hann ikki hevði latið seg keypa. So tað eru ikki bert javnaðarmenn, sum eru til sølu, tíðanverri.

Men har eru hóast alt fleiri men.

Midas kongur ynskti, at hann kundi fáa ta megi, at alt, hann rørdi við, bleiv til gull, og hann fekk hesa megi. Men eftir at hava rørt við blómurnar og síðani sína elskaða dóttur, sá hann tær ræðuligi avleiðingarnar, tað fekk. Blómurnar og dótturin høvdu lívsins virðir. Gullið var deytt.

Ein onnur søga sigur um skip, ið lendi á oydnari oyggj langt burturi frá øllum. Manningin fór í land, og teir funnu skjótt út av, at ovmikið av gulli kundi gravast úr jørðini, og teir gróvu og gróvu og gróvu, so gulldungarnir vuksu. Men veturin kom, og tá komu teir eftir, at teir høvdu forsømt at velta jørðina og skaffa vetrarføði, og sostatt lótu teir lív í gulldungunum.

Og hóast tað verður sungið: Vit á gullgøtum...... sum um...........

Góðu javnaðarfólk! Valið stendur ímillum at halda áfram sum narrar í stríðnum fyri einum fólkafloksparadísi ella at gerast socialistiskir stríðsmenn í einum góðum demokratiskum Føroyum við frælsi, javna og brøðralagi. Velja tit tað síðstnevnda, so eru mong at samstarva og gera stjórn saman við í fleiri av hinum flokkunum. Tí nóg onnur í øðrum flokkum vilja eisini eitt GOTT DEMOKRATISK FØROYAR við frælsi, javna og brøðralagi. Sjálvandi.

# Skulu vit minka fólkatalið í Sandoynni burtur í lítið og einki?

EYÐUN MOHR VIDERØ



Stríggið ella ógjørligt er at fáa javnvág í fíggjarløgtingslóg landsins. Fyribils úttalilsi siga eitt hall uppá 800 mió kr, onkur 1 mia. kr. Hetta eru stór tøl í mun til samlaðu ætlan landsins.

So kann ein spyrja, um ikki ber til bert at minka útreiðslurnar við hesari upphædd, so javnvág fæst í, men hetta gongur sjálvsagt ikki, tí tað eru ávísar grundleggjandi uppgávur hjá landskassanum, ið ikki kunnu steðgast!

Men tað eru summar uppgávur, ið politikarar skilja øðrvísi enn tað, fólkið vil!

Mær tykir, at tað grundleggjandi hjá okkara fólkavaldu er, at allar uppgávur í høvuðsstaðnum ikki mugu skerjast ella minkast. Væl veit eg, at í høvuðsstaðnum eru rættuliga týðandi uppgávur, ið viðvíkja okkum øllum. Skal í hesum føri bert nevna sjúkrahúsverkið. Men við at lurta nærri eftir politikarunum, so tykir mær, at tað eru tær nógvu atkvøðurnar í høvuðsstaðnum, ið telja mest!

Um vit hugsa okkum tvey ung pør, ið ætla at setast í bygv, og at bæði finna sítt arbeiðspláss í Havn:

Annað parið keypir sær hús í Tórshavn ella nærhendis, meðan hitt parið setir seg í búgv í Skopun. Hetta seinna er helst ættað úr Sandoynni, og ynskir tí at búgva her. Tað er bíligari at byggja her, serliga orsaka av grundstykkjaprísi, og verandi ferðaætlan hjá strandferðsluni ger hetta møguligt. Flestu staðni norðanfyri ber til at koyra til havnar til arbeiðis, men úr Sandoynni mást tú sigla-í hesum føri við Teistanum. Sama er sjálvsagt eisini galdandi fyri einlig ung fólk.

Ábøtur verða eftir umstøðum alla tíðina gjørdar í ferðamøguleikunum. Brúgvar og tunnlar, bæði undir og á verða og eru gjørdir. Seinasta átakið er, at Ritan skal røkja rutuna til Fugloy og Svínoy. Alt gott um tað, um henda loysn er nøktandi. Tá Nólsoy missir Rituna, so er ætlanin at seta Ternuna í hesa rutu, men hetta reisir ein nýggjan fíggjarligan trupulleika, tí Ternan sum størri skip krevur at hava fleiri starvsfólk sambært vaktarskipanina, so nú fær strandferðslan ein nýggjan fíggjarligan spurning at taka sær av, samstundis sum stovnurin skal spara vegna væntandi javnvág í fíggjarløgtingslóg landsins.

Hvat gera vit nú? Jú vit skerja túratalið hjá Teistanum, og so spara vit fólk á einari vakt og seta hesi umborð á Ternuna!. So kostar hesin parturin ikki nakað eyka. Sjálvt um kostnaðurin til skipanina hjá Teistanum sum sjúkrabátur kemur at vera umleið einar 4 tímar eyka um samdøgurið.

Vit í Sandoynni sita eftir við svartaperi. Svínoy/Fugloy saman við Nólsoy fáa eftir umstøðunum hóskandi ferðasamband. Við at fækka túrarnar til Sandoynna koma fleiri av yngru fólkunum ikki at kunna røkja arbeiði í Havn, og partvís aðrastaðni, og sítt heim í Sandoynni! So flyt, annahvørt til Havnar ella av landinum!

Eg ivist ikki í, at politikarar hava trupulleikar av fáa fíggjarstøðu landsins at hanga saman, men ofrið ikki Sandoynna, og latið Teistan hava núverandi ferðatúratal!

Tit góvu okkum henda møguleika fyri nøkrum árum síðan. Fólk hava tikið av hesum tilboðið og búsett seg í Sandoynni. Slítið ikki framtíðina hjá Sandoynni upp við rót!

# Álvaratos Tjóðveldi !!!

HELGI ABRAHAMSEN
løgtingsmaður



Bara rentan av at fíggja eina milliard í undirskoti, fer at kosta føroyskum skattgjaldarum einar 50 milliónir krónur um árið, og kortini skjýtur Tjóðveldi upp at lækka inntøkurnar uppaftur meira.

Meðan stríðst verður við at fáa ta fíggjarligu kabalina at ganga upp, og meðan úrslitið enn stendur á eini heilari milliard (1.000 milliónum krónum) í undirskoti, kemur Tjóðveldi, sum ketta upp úr høvdatrogi, og skjýtur upp, at avtaka blokkstuðulin. Hetta er tann reini ørskapur!

Í eini útvarpssamrøðu við annað av fíggjarnevndarumboðunum hjá Tjóðveldi fingu vit ta afturvendandi søguna: Blokkurin fyllir so lítið í búskapinum, og høvuðsorsøkin til bygnaðarligu trupulleikarnar er, at vit ikki taka ábyrgd av samfelagnum, og høvuðsorsøkin til at vit ikki taka ábyrgd av samfelagnum er blokkurin. Soleiðis fáa tey vent tingunum somikið á høvdið, at eftir stendur, at tað er ábyrgdarleyst ikki at tveita restina av blokkstuðlinum á vestfallið.

Hava tey slettis ikki skilt, hvussu álvarsom støðan er?

**Beinleiðis ósatt**

Í áðurnevndu útvarpssamrøðu varð sagt: "Vit skóru blokkin fyri átta árum síðani við einum triðingi og búskapurin vaks beinanvegin...".

Hetta er fyri tað fyrsta beinleiðis ósatt. Búskapurin vaks ikki beinanvegin eftir at blokkstuðulin lækkaði, og hví skuldi hann tað? Hvussu kann ein niðurskurður í blokkstuðlinum seta ferð á búskapin?

Men so kundi eg eisini hugsað mær at spurt, hvussu Tjóðveldi kann siga, at blokkstuðulin fyllir so lítið í føroyska búskapinum, men samtíðis siga tey, at búskapurin vaks beinanvegin, tá blokkstuðulin minkaði? Um Tjóðveldi heldur, at búskapurin vaks, tí at blokkstuðulin minkaði, so hongur tað ikki saman við pástandinum um, at blokkstuðulin hevur lítið at týða í búskapinum.

Hetta eru leysir pástandir, sum verða slongdir út til Føroya fólk.

**Gjald fyri vald**

Tjóðveldisumboðini í fíggjarnevndini kalla blokkin "gjald fyri vald". Eg má spyrja, hvat tað er fyri vald, sum tey tosa um? Vit kunnu gera Føroyar til fullveldi ella yvirtaka málsøki, tá vit sjálvi hava hug til tað. Vit hava buktina og báðar endarnar (tað vil siga alt valdið), og kortini pástanda tjóðveldisumboðini, at danir vilja gjalda eina milliard um ári fyri eitt vald, sum teir ikki hava.

**Blokkurin fíggjaði fullveldisundirskotið**

Heldur enn at lækka blokkstuðulin uppaftur meira, vil eg mæla Tjóðveldinum til at fara í holt við at gera tær tillagingarnar, sum áttu at verið gjørdar í 2002, tá tey seinast lækkaðu blokkstuðulin.

Tey reypa um, at avlopið frá 1998 til 2003 var 2,6 milliardir krónur, men tey gloyma at siga, hvussu stórt avlopið var tey einstøku árini. Tað fellir nevniliga í eyguni, at av teimum 2,6 milliardunum stava heilar 2,4 milliardir frá fyrra teimum frystu árunum (áðrenn blokkstuðulin lækkaði), og bara 0,2 millardir frá 2002 og 2003 (aftaná blokkniðurskurðin). Eisini gloyma tey at siga, at við í avlopinum á 2,6 milliardir krónur, eru 5,1 milliard í blokkstuðli, sum fullveldislandsstýrið fekk sendandi úr danska ríkiskassanum á hvørjum ári. Uttan hesar pengarnar var talan um eitt samlað undirskot á 2,5 milliardir krónur - í góðum tíðum! – Tað er ikki at standa á egnum beinum!